# Ættleiðingarfelagið í Miðlahúsinum






**Tónleikur, kunning og hugleiðingar verða skánni, tá Ættleiðingarfelagið skipar fyri tiltakið í Miðlahúsinum mikukvøldið klokkan 19.30.**

TILTØK
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Anja Andreasen, forkvinna í Ættleiðingarfelagnum, sigur við Portalin, at tey gleða seg til at síggja nógv fólk, bæði limir og onnur, til tiltakið í Miðlahúsinum mikukvøldið klokkan 19.30.

Á skránni verður tónleikabólkurin Trífljóð, við teimum trimum tvørfloytuspælarunum Anju Andreasen, Jonnu Sjúrðaberg, Olgu Skorastein, sum fer at spæla hugnatónleik.

Síðani fer Marjun Lómaklett, hjálparprestur í Suðurstreymoy, at hugleiða um at vera ættleidd. Marjun kom úr Korea sum barn, og er í dag fyrst í tríatiárunum.

Til endans fer Karen Heinesen, adoptionskonsulentur hjá Ríkisumboðnum, at greiða frá sínum leikluti í ættleiðingargongdini. Karen vitjar og innstillar familjur, sum søkja um at ættleiða.

Ættleiðingarfelagið varð sett á stovn á vári í 2004, og hetta er fyrsta tiltakið felagið skipar í ár. Í løtuni eru eini 60 familjur í felagnum, sum er ætlað øllum, ið hava við ættleiðing at gera. Tiltakið er alment og ókeypis.




Vika 7, 2007

# Ein lækking fyri framman

MARKNAÐARRÁK

Seinastu 8 mánaðirnar er vísitalið yvir 500 tey størstu virkini í USA hækkað 18,5%, svarandi til umleið 14,5% í okkara gjaldoyra. Nógv bendir á at ein rætting niðureftir er fyri framman. Støðugt fleiri tekin eru um hetta. Hækkingin í marknaðinum hevur mist ferðina. Lutfalsliga nógv verður handlað, men kursirnar hava onga kós í løtuni og standa á einum vegamóti. Eyguni verða tí vend móti gongdini komandi dagarnar. Hóast eina lækking í partabrøvum, meta vit ikki at broytingar eru í teimum grundleggjandi viðurskiftunum. Vit síggja tí eina komandi lækking sum ein keypsmøguleika.

## Yen heldur á at vikna

Japanski yen er viknaður javnt og samt mótvegis bæði evru og dollara seinasta árið. Mótvegis donsku krónuni er yen viknaður 12% seinasta árið. Orsøkin er í stóran mun, at íleggjarar læna í yen og leggja í til dømis brasilska real í staðin. Hetta tí at rentan í Japan er sera lág (0,25%), og hon er høg í til dømis Brasil (13%). Farna vikuskifti var G7-fundur, og heldur ikki hann fekk yen at styrkna. Luttakararnir løgdu tó dent á, at búskapurin í Japan er í betring, og at gjaldoyramarknaðurin heldur átti at verðið stýrdur av búskapunum enn tílíkum spekulativum handlum. Saman við yen vikna onnur gjaldoyru í Fjareystri eisini.

## Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarentur vóru aftur støðugar hesa farnu vikuna. 10-ára rentan er 4,11%. 1-árs rentan liggur enn umleið 4,25%. Hon er sostatt ikki ávirkað av, at ECB gav ábendingar um, at stutta rentan verður sett upp í næsta mánað. Hetta var longu innroknað í lánsbrævarentuna.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna verður USA í andgletti. Haðani kemur ein rúgva av áhugaverdur lyklatølum, til dømis ídnaðarframleiðsla og vinnuálit. Eisini eru roknskaparkunngerðir frá norðurlendskum virkjum á skránni.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 574,84 | -0,1% |
| JPY | 4,71 | -0,3% |
| GBP | 1.119,64 | -0,8% |
| NOK | 91,91 | 0,7% |
| SEK | 81,58 | -1,0% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,22 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 131,94 | 1,2% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 609,00 | 10,6% |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,63 | -0,2% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*